
elin@sosialurin.fo


karim@sosialurin.fo


jan@sosialurin.fo


jonbrian@sosialurin.fo


hersim@sosialurin.fo

# Skráin fyri Rás 2

## Týsdagur 5. februar

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunroðin – James Olsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunroðin heldur fram – James Olsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttir er vertur
15:00 Tíðindi
15:05 Seinnapartsending úr Klaksvík
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartsending úr Klaksvík Heldur fram
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Seinnapartsending úr Klaksvík (e)
21:00 Á Torginum (EVR) – Svenning av lofti leggur til rættis
21:30 Bestubitar – Innsløg frá degnum og tónleikur

## Mikudagur 6. februar

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsendingin – Eyðun Klakstein leggur til rættis
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsendingin heldur fram
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsendingin – Gesturin Eyðun Klakstein leggur til rættis
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttir er vertur
15:00 Tíðindi
15:05 Pink – Ungdómssending við Ragnhild, Heiðu og Sóley
16:00 Tíðindi
16:05 Pink heldur fram – Ungdómssending við Ragnhild, Heiðu og Sóley
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Morgunsendingin (e) Eyðun Klakstein leggur til rættis
21:00 Úr skjáttuni – Heimamissiónin skipar fyri
22:00 Morgunsendingin (e) – Gesturin
23:00 Pink (e) – Ragnhild, Sóley og Heiða leggja til rættis

MORGUNSENDINGIN
MIKUDAGIN 9.00-12.00

## Kamphanarnir samstarva



Undir løgtingsvalinum vóru Bill Justinussen og Sjúrður Skaale í rúkandi heitum kjaki um átrúnað og politikk. Sjúrður samanlíknaði Miðflokkin við prestastýrið í Iran, og Bill svaraði, at skuldi hann verða líka óseriøsur, so kundi hann líkna Tjóðveldi saman við Nazi-Týskland. Nú eru Bill og Sjúrður í samgongu saman og skulu samstarva í løgtinginum. Hvussu skal samstarvið fáast at rigga? Og hvat er í grundini prísurin fyri at fáa vald? Sjúrður Skaale og Bill Justinussen eru gestir millum klokkan 11 og 12.

MORGUNSENDINGIN
MIKUDAGIN 9.00-12.00

## Hippie-ungin tekur fólk á bóli



22 ára gamla Aura Dione hevur havt ein serstakan uppvøkstur. Ættarbondini røkka so víða sum til Fraklands, Spania og Føroyar, og foreldrini, sum ferðaðust bæði á havi og landi, syrdu fyri, at barnaárini vóru heilt serlig. Aura vaks upp við tónleikinum, sum foreldrini spældu til veitslur í heiminum, men nú hevur hon gjørt sín egna tónleik og fær fimm og seks stjørnur fyri fyrstu útgávuna, sum ummælarar siga er í altjóða flokki. Vit práta við Aura Dione og hoyra hana siga søguna um seg og sín tónleik.

## Rættur føroyskur rockur



Stjórin á plátufelagnum RecArt, sum fríggjadagin gevur nýggju fløguna hjá The Dreams út í Danmark, heldur, at eingin bólkur í Danmark er sum The Dreams, og tí kann framtíðin hjá føroyska bólkinum gerast heilt spennandi. Vit spyrja Jens Ove Friis, hvís hansara plátufelag hevur tikið The Dreams til sín.

## Tá klokkan steðgaði í Manchester




Mikudagin eru tað liðin 50 ár, síðani stjørnuliðið hjá enska fótbóltsfelagnum Manchester United var í eini ræðuligari flogvanlukku, og stórur partur av liðnum lat lív. Hetta er ein hending, sum eigur serligt pláss í søguni hjá felagnum, og tað verður eisini staðfest við eini serligari klokku á leikvøllinum hjá Manchester United. Vit tosa við ein United-fjeppara um lagnudagin fyri júst 50 árum síðani, og hvussu hendan hendingin hevur ávirkað felagið.

eydna@ras2.fo


eydun@ras2.fo


eydfinn@ras2.fo james@ras2.fo


mirjam@ras2.fo


RÁS 2
...títt radio

TÓRSGØTA 1 FO-100 TÓRSHAVN TEL 35 99 99 RAS2@RAS2.FO